# Fleiri tons av gulli undir World Trade Center

Teir, sum rudda í leivdunum eftir World Trade Center, hava funnið fleiri tons av gull- og silvurstykkjum. Stór virði liggja framvegis undir toftunum.

Gullið fylti upp í meiri enn tveir lastbilar og er fleiri milliardir krónur vert. Beint eftir at ruddingarmenninir vóru komnir fram á gullið, uddi tað við embætismonnum frá FBI og Secret Service, sum høvdu fingið til uppgávu at ansa eftir, at eingin skuldi gera sær dælt av tí virðismikla fonginum.

The Bank of Nova Scotia hevði eina goymslu í kjallaranum á World Trade Center. Har goymdi bankin sítt gull og silvur sum trygd í sambandi við gjaldoyrahandil, og tað er eftir øllum at døma hetta gullið, ruddingarmenninir nú hava funnið.

Amerikanska samveldisløgreglan FBI gav boð um eyka vaktarhald á staðnum longu beint eftir atsóknina at World Trade Center tann 11. september, og menn hjá FBI hava síðani verið á staðnum, meðan bjargingarliðini hava ruddað.

Fjølmiðlar í New York siga, at tað framvegis liggja stór virði undir toftunum. Ruddingarmenninir hava eisini fingið strong boð um ikki at fara inn í goymsluna hjá Bank of Nova Scotia, og FBI hevur hótt við at taka skotvápnini í nýtslu, verður forboðið brotið.

Tað mesta av gullinum varð flutt á eina tryggari goymslu í gjár undir strongum vaktarhaldi.

*(farTekst)*






# Annan til Oslo at taka ímóti

Nobel-friðarheiðursløning verður handað tann 10. desember.

ST-skrivstovan í New York boðaði í gjár frá, at aðalskrivarin, Kofi Annan, fer til Oslo at taka ímóti ársins Nobel-friðarheiðursløn, sum í ár er býtt millum Annan og sjálvan heimsfelagsskapin. Í Oslo skal Kofi Annan umboða seg sjálvan, meðan ST verður umboðað av formanninum á aðalfundinum, suðurkoreanska uttanríkisráðharranum Han Seung-soo, sum skal taka ímóti vegna heimsfelagsskapin.

Tað er tó frammanundan avgjørt, at Kofi Annan skal halda ársins Nobel-fyrilestur undir hátíðarhaldinum.

Friðarheiðursløningin er 8,3 milliónir norskar krónur, men sambært ST-talsmanninum Manoel de Almeid e Silva, hava hvørki ST ella Annan tikið støðu til, hvat peningurin skal nýtast til.

Nobel-friðarheiðursløningin verður handað tann 10. desember.



## Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýndan heiður á 75 ára føðingardegi mínum 5.10.

*við Rangá 31.10.*
**Ejler Djurhuus**



